# Næraberg heldur fram

**Svartkjaftatrolarin Næraberg hevur ikki havt serliga gott úrslit, síðan hann kom í føroyska flotan fyri hálvumøðrum ári síðani. Stjórin í JFK Trol, Hanus Hansen, ásannar hetta, men verkætlanin við Nærabergi heldur fram**



*Næraberg hevur ikki kastað nógv av sær higartil. Hetta hevur tó ikki við sær, at verkætlanin við Nærabergi steðgar*

FISKISKAPUR
*Stefan í Skorini*

Næraberg hevur verið eitt tungt tak hjá fyritøkuni JFK Trol. Trolarin kostaði 225 milliónir at keypa, og tað er størsta føroyska skipakeyp nakrantíð. Men úrslitini hava ikki verið so góð higartil. Hetta skrivar Dimmalætting leygardagin. Roknskapurin fyri árið í fjør vísir millum annað, at undirskotið var 12,2 milliónir krónur.

Næraberg roynir eftir svartkjafti alt árið, og hann verður virkaður til surimi umborð.

Hanus Hansen, stjóri á JFK Trol, ásannar, at tað ikki hevur gingið serliga væl hjá største trolaranum í landinum. Hann vísir tó á tvey týdningarmikil viðurskifti, sum ikki hava lagað seg væl hjá felagnum. Prísurin á surimi hevur ikki verið góður, og oljuprísurin gongur eisini skeiva vegin.

– Orsøkin til at tað ikki hevur hilnast so væl hjá okkum er, at prísviðurskiftini á hesum økinum ikki hava gingið eftir vild, sigur Hanus Hansen.

Hann vísir á, at tá talan er um so nógv tons av surimi og av olju, so er prísurin av alstórum týdningi fyri endaliga úrslitið. Tá prísurin bara ger eitt lítið lop annan vegin, so merkist tað væl hjá Nærabergi.

Flest allar vørur, sum verða seldar til Japan, hava havt vánaligari prís enn vanligt. Hetta kemst av kreppu í Japan, og tað merkist eisini væl hjá JFK Trol.

Hanus Hansen ivast tó ikki í, at verkætlanin hjá felagnum við Nærabergi heldur fram.

– Vit hava ongar ætlanir um at steðga við hesum. Vit fara at royna at hanga í, sigur Hanus Hansen at enda um trolaran Næraberg.






Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

A.
Navn: P/F Kall (P/F-nr. 2868), 100 Tórshavn.
og
B.
Navn: P/F Tele F (P/F-nr. 3076),100 Tórshavn.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F- lógini.

Skráseting Føroya tann 16. oktober 2001

Kristin Balle

# Bilar

Nr. 201 • hósdagur • 18. oktober 2001 • 75. árg.

# Toyota Camry – kemur nú í nýggjari útgávu



*Camry innan. Her í luksusútgávuni við multi-informatiónsdisplay og koyriteldu*



*Fyrst í november kemur nýggi Toyota Camry til landið. Bilurin hevur fingið nýtt og smart design. Eisini er trygdin, kvaliteturin og koyrieginleikarnir á sera høgum støði*

**Seinast fýra árini, frá 1997 til 2000, hevur Toyota Camry verið mest seldi persónbilur í USA. Fyrstu Camry bilarnir komu til USA í 1983, og síðan 1988 hava teir verið framleiddir í Georgetown í Kentucky**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Av tí at USA er heimsins størsti bilmarknaður, er Camry ein sera týðandi bilur fyri Toyota. Hetta er orsøkin til at so nógv orka er brúkt til at menna og framleiða hendan nýggja Camry bilin. Hann sær eisini heilt annarleiðis út enn forgangarin, og bæði trygdin, kvaliteturin og komforturin eru nú á sera høgum støði. Framsetrini eru útgjørd við WIL-funktión, soleiðis at um bilurin verður ákoyrdur aftanífrá, er vandin fyri at fáa mein í nakkan og ryggin sera avmarkaður.

**Kemur í november**

Frá Reyni Service verður sagt, at teir vænta at teir fyrstu bilarnar koma í november. Tað verða Camry 2.4 við VVT-i tøknini og 155 hk, bæði við manuellum og automatiskum girum. Annars fáast teir eisini við 3.0 V6 motori og 189 hk. Hesin nýggi Camry er gjørdur til at koyra long strekkir, uttan at førarin og tey ferðandi skulu troyttast. Listin yvir eykaútgerð er langur. Vit kunnu nevna til dømis automatiskt klimaanlegg, multi-informatiónsdisplay við koyriteldu og automatiskar regnsensorar.



*Aftan og á síðunum er Camry mest broyttur*

*Kelda: Toyota Family*



# Bilar á Debesartrøð í sambandi við kongsvitjan í 1969

**Hendan myndin er tikin á Debesargøtu í 1969, tá kongurin, Frederik IX var her á vitjan**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Bilarnir fremst á myndini eru ein Rambler Classic hjá Martin Kristiansen, sum koyrdi í Auto, og ein Ford Taunus 17m frá bilstøðini Bil. Bilurin sum Frederik kongur er á veg yvir ímóti, er ein Toyota Crown hjá Gorm Simonsen. Maðurin við bilin er Martin Joensen, á Borg, sum koyrdi bilin. Bilarnir eru skrýddir við føroyskum og donskum fløggum. Leggið til merkis, at Hýruvognur stendur á bilunum.

*Myndaeigari: Anna Joensen*